NASSER til Finlands

Finski forsetin Urho Kekkonen, sum hevur verið á vitjunnarferð í Egyptalandi, hevur bjóðað Nasser, forseta, at vitja Finland, og væntuliga kemur henda vitjan í lag.

Nasser

Fíggjarstøðan

Londini í vesturheiminum kunnu teoretiskt hjálpa hinum partinum av heiminum, men vilja ætlandi skerja hesa hjálp í somu løtu sum fíggjarligir trupulleikar koma til sjóndar. USA hevur stórar trupulleikar við príshækkingunum og teimum stóru útreiðslunum til Viet namkríggið. Í Europa er Vesturtýskland ikki væl fyri fíggjarliga. Í Bretlandi gongur smátt framá. Fíggjarviðurskifti Frankaríkis eru ógvuliga ivasom. Hesir fíggjartrupulleikar røkka teimum minni londunum eisini; teir byrjaðu at gera vart við seg seinasta ár og koma ætlandi at merkjast meira í hesum árinum.

Móttrýst

Vesturtýska stjórnin roynir nú at fáa diplomatiskt samband við londini eystanfyri jarntjaldið. (Diplomatiskt samband hava teir leingi havt við Sovjet.)

Hetta dáma ikki eysturtýskarum, sum nú royna at fáa eystanlondini at seta sum treyt, at Vesturtýskland viðurkennir Eysturtýskland sum sjálvstøðugt ríki.

Fyrst hjálparmannin

Stríðið milum Kina og Sovjet harðnar í hvørjum, og bløðini gerast alsamt hvassari hvørt við annað — serstakliga tey kinesisku bløðini eru ofta ógvuslig og stak hvøss við russar, sum verða skuldsettir bæði fyri líkt og ólíkt. Fyri stuttum skrivaði »Fólksins dagblað« í Peking hvassliga:

»Áður enn ein kann knasa ránsmannin (USA), er tað neyðugt at knasa hjálparmann hansara (Sovjettsamveldið)«.

Gull-svinn

Í desember minkaði gullnøgdirnar hjá USA við 27 milj. dollars. Hetta var triðji mánaði upp í røkur við stórum gullsvinni.

Í november minkaðu gullognirnar við 49 milj. dollars; men í desember øktist útlendski valutaágóðin.

VANDAMIKIL

Politiið í New York tók nýliga eina lærarinnu úr Arizona. Í kuffertinum hevði hon ein flammukastara og ymisk skjótivápn.

Gjalda 70 pst.

Kinamenn viðganga nú opinskaraðir, at teir bera 70 pst. av kostnaðinum hjá Norðurvietnam og Vietcong í Vietnamstríðnum.

LÍV Á MÁNANUM

Sovjettiski visindamaðurin, biokemikarin Alexander Oparin, sigur, at teir, ið fyrstir koma uppá mánan, fara at raka við, at har hóast alt ikki er sørt av lívi.

Hann heldur, at vissir formar fyri lívi eiga at kunna liva niðri í mána skorpuni, har tað er væl vart fyri radioaktivari stráling og tær harðrendu lívstreytirnar á mánanum.

Fleiri hermenn

Australski forsætisráðharrin Harold Holt boðar frá, at Australia verður at økja herdeildir sínar í Vietnam úr 4500 upp í 6300 manns.

Aftrat hesum lata teir 8 bumbuflogfør og ein destroyara til Vietnams.

Bjóðaði atombumbur

Táið franskmenn vóru illa fyrikomnir í Vietnam í 1954 og bert høvdu skansan Dien Bien Phu eftir, bóðu teir amerikumenn um hjálp. Nú er komið í ljósmála, at táverandi uttanríkisráðharri John Foster Dulles bjóðaði franskmonnum atombumbur; men teir tóku ikki av.

* Ein treyt fyri øllum lívi er
* vatn, men eisini tað, metir
* hann, er at finna í mánaskorp-
* uni.

BETHEL — Sverrisgøta

Bíbiltími kl. 9.30 og prædika kl. 10.30 leygardagin.
Sunnudagsskúli kl. 11.00 sunnudagin.

Max Catto:

FEIGDARFUGLAR

(Framhald)

Í fyrstuni saknaði eg múldjórini mest sum tey vóru ein uggi, men so við og við fóru vit at sakna tey av álvara. Akslar mínir vóru vátir av sveitta undir váðunum, eg bar. Eg mintist afturá, táið eg sum átjanára gamal plagdi at vandra gjøgnum Voralberg skógirnar við guitari og stórari byrði av viðføri á rygginum ... og her var eg so ússaligur, at tað gekk upp hjá mær at bera hetta sindri ið lættliga hevði verið borið av dvørgi. Ikki er altíð stuttligt at minnast aftur á ungdómin.

Men menninir framman — ella ið hvussu er teir tveir — sjabbaðu alt samt við sama lag. Blámaðurin og faðir Doonan virdu sjálvandi einki um at bera. Teir gingu so varisliga fyri ikki at vekja tey sovandi børnini, teir bóru. Harry Frobisher stikaði stinniliga á og royndi at leggja sum mestu vektina á høkjuna. Eg helt at hann mundi ikki orka leingi aftrat at bera ferðafólk uppi á sær — eg skilti fullvæl, hvussu ringt hann mundi hava tað av hasum meinslaða beininum.

Marcel gekk framyvirbogin sum løggut apa. Barnið á ryggínum mundi helst sova — og sjálvur gekk hann og las eiðir og blótanir í heilum.

Fyristøðukvinnan veitraði meg til sín so ótolin. Hon hevði okkurt at siga. Kvinnur vilja práta, um tað so er í helvitis forgarði.

Eg visti hvat ið feilti henni, og hon byrjaði eisini beinanvegin meðan hon skeitti yvir á rygg Marcels: »Eg fati yvirhøvur ikki hatta menniskja«.

Tað legði eg so lítið í. Eg hevði nokk við at anda, so dánt.

»Eg fati hann ikki«, helt hon fram. Stutt frammanundan hevði faðir Doonan sagt nakað tað sama um Frobisher — líkasum summi halda seg hava sjálvsagdan rætt til at fata hvønnannan og lesa í hvørjum øðrum, eins og tú kann hyggja gjøgnum bakteriur á eini glasplátu. Eg ønti ikki aftur. Svaraði eg nú, hevði eg mist tað sindri av megi, eg hevði eftir, út gjøgnum munnin, eins og tú snarar krana frá.

Tá segði hon nakað sum gjørdi meg bilsnan.

»Høvdu tygum tora at lata peningapung tygara liggja vísan, um hann var í nánd?«

»Bert um eg ætladi at givið honum tað, í honum var.«

»Hasin maðurin er eitt beist.«

»Óivað«.

»Hann er lygnari, hann er konufólkarevur«. Hon læi so hás á málinum. »Eg havi sjálv roynt tað av honum. Men fata tygum hann kortini? Hann blotnar um hjartað, táið hann hoyrir eitt kriatúr skríggja av pínu.«

»Hann hevur kanska størri tokka til djór enn til fólk«.

»Á«, segði hon, »tygum eru eitt gamalt turka træ. Tit mannfólk eru forrestin øll eins, tá ið alt skal sigast. Men vita tygum, hvat ið eg haldi? Eg haldi at hetta ólukkudýrið helst man vera eitt sindur merkiligur«.

Eg hugsaði, at um vit fóru at kanna eftir, so mundi alt livandi vera nakað løgið yvirhøvur. Men aftur enn eina ferð gjørdi hon meg bilsnan, tá ið hon segði: »Mær líkar hann.«

»So«, segði eg, »men ger hon um so tann beina, at fara inn í kjarrið við honum.«

»Var hatta vakurt sagt?«

»Hann hevði ivaleyst hildið, at tað hevði verið vakurt av tygum at gjørt sum hann vildi«.

»Tygum eru fúlur. Kynjarlívið er sanniliga ikki alt«. (Eg man helst hava lisið skeivar bøkur.) »Fyri alt tað, so eri eg sjúkrasystur«, segði hon — rætt sum at sjúkrasystrar skuldu verið eitt slag av menniskjum, ið ongar natúrligar átdráttir høvdu.

»Hm«, segði eg, táið kvinna er úrlatin, sæst ikki, antin hon er sjúkrasystur ella ikki«.

»Eg haldi ikki hann nakransinna hevur verið undir ávirkan av góðum, vælvandum kvinnum«.

»So hevur eydnan spælt við honum. Tí tað var óivað tað síðsta, hann hevði hugsað sær«.

»Tað hevði komið honum væl við«.

»Men tær kvinnurnar høvdu so ikki longur verið góðar og vælvandar«. Eg hugdi hugsunnarsamur at henni og hugsaði um søgurnar, ið gingu um hana í horhúsum Parisar. Var hugurin komin aftur frá tí tíðini, ikki var gott at vita?«

»Hoyri meg«, segði eg hvassliga. »Haldið tygum frá honum. Enn veit hann ikki, hví hann er komin higar niðan. Hann er líka hættisligur sum bjørn í fellu. Hann er bangin, hann kom bert higar av trúfesti móti vinum sínum«.

»Trúfesti er eisini nakað gott ...«

»Vit hava ikki roynt hann í trúfesti móti okkum. Lat okkum bert royna at sleppa longur fram, og kanska sleppa livandi burtur úr hesum«.

»Kenna tygum einki takksemi móti honum?«

»Eg eri av øðum kyni. Eg hava einki at samsýna honum við.« Eg tók meg afturum. Her nyttaði einki at tosa. Men tá ein tíð var fráliðin, fór eg kortini at hugsa eitt sindur annarleiðis um Marcel. Mær líktist væl á hann. Ikki tí hann innarst inni var góðdýr — men tí hann var dámligur maður. Mær hóvar væl hetta bræneyggaða slagi. Mær rann beinleiðis tokki til hesar pussigu og eymu »trimenningarnar«, tí teir gjørdu meg forvitnan. Tey góðu og rættskafnu er tað einki stuttligt at vera í hóslag við, vita tygum nokk. Tá ið ein verður so gamal, at tað ikki rørur ein at vera í vána lag og táið ein einki eigur, ið kann takast frá einum — so er bara fittligt at vera saman við brotsmonnum. Tað er fyri tað mesta skemtiligt í felag við teimum.

So snávaði eg og datt — so langur sum eg var —. Har var einki stuttligt tað náttina.

Vit komu tvarrandi fram eftir upsini. Mánin lýsti ikki mikið; vit tordu ikki at fara oman í tætta skógin í dalinum, meðan myrkt var. Hetta var strævin gongd. Óvitarnir gingu sum í svøvni. Eg hevði góðan hug at detta niður og hvørva burtur úr.

So rópti fyristøðukvinnan einaferð deyðagivin: »Hoyri tit mannfólk, halda tit ikki skjótt, tað man vera nógmikið? Høvdu tit ætla tykkum líka til Honolulu í nátt?«

Faðir Doonan vendi sær á heilt bilsin. Hann hugdi at teim um útmøddu børnunum, blunkaði við og segði: »Hatta áttu tygum at sagt fyri langt síðani. Eg hugsaði bara at nú gekk tað so væl framá«.

Hann setti barnið av sær í grasinum; tað ikki so mikið sum rivaði fyri eygunum. So fór hann yvir til Frobisher at hjálpa honum at taka av sær, meðan hann stardi inn í andlit hansara so spentur, tí hann visti fullvæl, hvussu hann píndist. Frobisher deysaði so spakuliga umkoll. Marcel legði barnið varisliga av sær, og beinanvegin sprakk hann saman við Charlie yvir til vinmannin. Teir løgdu hann so væl til rættis í grasinum.

Fyristøðukvinnan legði seg undir liðina á mær, og áðrenn hon læt eyguni aftur, segði hon avgjørt við faðir Doonan: »Hesa ferð verður tað ikki bara ein lúrur. Tí so verður tað bara til at tygum noyðast at bera bæði meg, henda neyðar ónyttuga doktaran og øll børnini. Vit mugu sleppa at sova til tað lýsir«.

(Framhald)